Fiskiflotin:

# Skulu taka støðu til semingsuppskot í morgin

**Klokkan 02 týsnáttina legði semingsstovnurin eitt nýtt semingsuppskot fyri Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara-og Navigatørfelag**

FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útlitini til semju í sáttmálatrætuni millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag vóru vánalig mánadagin, sum freistin at gera nýggjan sáttmála gekk út á midnátt. Men, sum dagurin leið, skiltist, at samband var millum partarnar, og tá ið leið út á kvøldið, vóru útlitini til, at semingsstovnuri fór at leggja eitt nýtt uppskot fyri partarnar.

### Langt á mál

Samráðingarnar slitnaðu annars seinasta mikudag, tá ið bæði Føroya Reiðarafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag vrakaðu eitt semingsuppskot frá Terja Sigurðssyni og Jóannesi Djurhuus.

Langt hevur verið millum partarnar, men spurningurin er, um verkfallið, sum hóttir fiskiflotan, fer at bloyta støðuna millum partarnar.

Í samrøðu við Sosialin í gjár, segði formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, at felagið ikki er nøgt við, at nýggi sáttmálin verður útreiðsluneutralur, tí hann heldur, at yvirmenninir umborð á føroyskum fiskiskipum hava ráð at bera eitt sindur meira, nú gongdin hjá fiskiflotanum sum heild er vánalig.



*Nógv stendur upp á spæl, og báðir partar mugu slaka, um nýggja semingsuppskotið, sum semingsmenninir nú hava lagt fyri partarnar, skal vinna frama.*



*Eitt møguligt verkfall í fiskiflotanum fer at raka øll fiskiskip, sum hava skiparar og stýrimenn, sum sigla eftir sáttmála millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag*

### Avgerast í morgin

Nú nýggja semingsuppskotið varð lagt fyri partarnar um 02-tíðina týsnáttina, ynskti Føroya Reiðarafelag at fáa høvi at leggja uppskotið fyri limirnar, og samstundis fekk Føroya Skipara-og Navigatørfelag somu tíð at viðgera nýggja semingsuppskotið.

Sostatt skulu feløgini bæði hava svarað semingsstovninum í seinasta lagi í morgin, um tey góðtaka ella vraka uppskotið.

Ógjørligt er at meta um, hvat úrslit fer at spyrjast burtur úr viðgerðini.

Kanska fara feløgini at samtykkja uppskotið - og kanska fara tey at vraka tað.

### Rakar meint

Skal nýggja semingsuppskotið loysa trætuna, er neyðugt, at bæði feløgini taka avgerð um at samtykkja uppskotið sum fyriliggur.

Eitt møguligt verkfall í fiskiflotanum fer at taka øll fiskiskip, sum hava stýrimenn og skiparar, ið sigla eftir sáttmála millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

Í hesum umfari verða strandfaraskipini og farmaskipini ikki rakt av einum møguligum verkfalli.



*Enn er einki avgjørt um, hvørt fiskiflotin verður raktur av verkfalli ella ikki. Tað fer dagurin í morgin at siga okkum*

# Nógvur aktivitetur á bryggjuni í Saltangará



*Fríggjamorgun í Saltangará. Trý skip landa, og menn hjá Beta eru í holt við at gera Bak og Stelk, sum hesaferð hava landað í Hanstholm, út til nýggjan túr*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var nógvur aktivitetur á bryggjuni í Saltangará, tá ið Sosialurin var framvið tíðliga fríggjamorgunin.

Partrolararnir, Safir og Smaragd, lógu við fullari last, umleið 220.000 pundum tilsamans og Oknin, sum er á garnaveiði, landaði eini 12.000 pund av svartkalva.

Umframt landingarnar hendan morgunin, vóru fólk hjá Beta eisini í holt við at koyra kør umborð aftur á partrolararnar, Bak og Stelk, sum á seinasta túri landaðu í Hanstholm. Teir høvdu eini 330.000 pund, meginparturin upsi.

Á Beta siga tey, at trolararnir seldu fyri 870.000 krónur netto, sum er ein hampiligur túrur, hóast longu leiðina til marknaðin